# 2004

# ÍTRÓTTARFELAG FUGLAFJARÐAR




# ÍF – KÍ

**STEYPAKAPPING**

**Leygardagin 8. mai 2004 Kl. 15.00 í Fuglafirði**

HAVSBRÚN

TOYOTA MIKLAGARÐUR P/F Petur Larsen

**Ítróttarfelag Fuglafjarðar**
Postboks 94
530 Fuglafjørður
Tel 444636 / 228771
Fax 444634
www.if.fo
if@if.fo

**Leikskrá 1 2004**

**Útgevari:**
**Ítróttarfelag Fuglafjarðar**
**ÍF-stuðlar**

**Ábyrgd**
ÍF-stuðlar

**Blaðnevnd**
ÍF-stuðlar

**Myndir**
Álvur Haraldsen/
Sosialurin
Rógvi Róin

**Kápumynd**
Rómur á ÍF-leikarum
eftir at Eyðolv hevur
økt til 4-2 ímóti NSÍ
sunnudagin.
*Mynd: Rógvi Róin*

**Prent**
Estra

**Uppseting**
Sisero 351800

### TAÐ HALDA VIT

# Vit hava eitt gott lið

Fyrst mugu vit á leikskránni bjóða tykkum øllum vælkomnum aftur til dyst í Fuglafirði á "hægri" støði; hesaferð til fjórðingsfinalu í steypakappingini ímóti KÍ. Seinast vit høvdu leikskrá til ein dyst í 1. deild var aftur í 1999. Eftirsum tað eru so mong ár síðani, hildu vit, at tað nú var upp á sítt pláss at gera eina "ordiliga" leikskrá. Ikki tí; tær kopieraðu vóru fínar, men nú, tá ið felagið og liðið stremba høgt, vilja vit gera tað sama. Tí er leikskráin, sum tygum lesa í ídag, tann fyrsta, sum ÍF nakrantíð hevur prentað í litum. Og í hesum sambandi vilja vit takka øllum lýsarum fyri fyrimyndarligu undirtøkuna, sum krevst, fyri at ger eina slíka leikskrá.

Ná, men aftur til fótbóltin, sum nú veruliga er farin í gongd. – Prátað verður óført um lands- og steypakappingina, og tey tíggju liðini verða vigað á ymiskum vektum. Vit kunnu tó bert vera samd um, at hjá okkara monnum hevur gingið væl higartil, sjálvt um gulu grannarnir hava verið tungir at bast. – Vit hava trý stig í landskappingini eftir 4-2 sigurin á NSÍ síðsta vikuskifti. Og í dag leika vit fjórðingsfinalu ímóti KÍ í steypakappingini. Liðið, sum vinnur dystin í dag, fer víðari í hálvfinaluna, har mótstøðuliðið er vinnarin av dystinum millum GÍ ella NSÍ, sum eisini leika fjórðingsfinalu ídag.

Vit eru sannførdir um, at tað er ikki av tilvild, at tað hevur gingist so væl hjá okkara monnum í avgerðandi dystunum. Mest sum allir leikararnir frá vinnandi 2. deildarliðnum í fjør eru við aftur í ár. Umframt hesar hava vit fingið góðan styrk í afturkomnu fuglfirðingunum; Bartali, Magna og Bárði, umframt teimum báðum klaksvíkingunum, Karstini Joensen og Rúna Eltør.

Í mun til okkara leikarar hava teir allir tann fyrimun, at teir hava royndt seg í 1. deildarfótbólti áður. ÍF stuðlar – sum er stuðlafelagið hjá fótbóltinum; í ár tó við serligum atlitið til 1. deild – venjarin, hjálparfólki og felagið høvdu ynski um, at leikarar, sum felagið

*Framhald a bls. 8*



### DYSTURIN I DAG

# ÍF og KÍ hava ikki verið steypalið

*Jóannes Hansen skrivar*



*Rúni Elttør hevur júst sett høvdið á bóltin og lagt okkum á odda 3-2 ímóti NSÍ*

Tað er ikki á hvørjum ári, at ÍF og KÍ stríðast um pláss í hálvfinaluni. Føroyska steypasøgan gongur aftur til 1955. Í 1954 hevði HB við styrki úr B36 verið í Íslandi. Á Ísafirði fingu teir handaða gávu frá fótbóltsfeløgunum har - Hørður og Vestri. Gávan var silvurbikar, sum varð latið føroyskum fótbóltsliðum at kappast um. ÍSF gjørdi av, at meistaradeildin skuldi spæla um Ísafjarðarbikarið í eini steypakapping. Fyrsta kappingin var í 1955, sigur Jógvan Arge í Havnarmenn í Gundadali.

Ásetingarnar um Ísafjarðarbikarið søgdu, at tann, sum eftir tíggju ár átti flestu sigrarnar, hevði vunnið steypið til ognar. HB vann bikarið til ognar í 1964. Tá høvdu teir vunnið seks ferðir og TB fýra ferðir. Síðani vann HB tríggjar Ísafjarðarsúlur til ognar. Eina í 1973, eina í 1980 og aftur eina í 1988. Hørður og Vestri á Ísafirði gávu allar súlurnar. Í 1989 gav Føroya Landsstýri Løgmanssteypið at kappast um. HB vann tað til ognar í 1998, og so var nýtt steyp givið. Tað vann KÍ í 1999, GÍ í 2000, B36 í 2001, NSÍ í 2002 og B36 í 2003.

ÍF luttók fyrstu ferð í meistaradeildini í 1971. Fuglfirðingar hava ongantíð vunnið súlur ella steyp, men tvær ferðir hava teir tapt finalur ímóti HB. Fyrra ferðin var í 1976. Íslendingurin Orn Eyjolfsson, sum vandi ÍF 1974-1976, hevði fyri síðstu ferð ábyrgdina av ÍF í finaluni. Talan var um tveir finaludystir. Í Fuglafirði vann HB 5-1, og í Gundadali endaði tað 2-2. Jákup Frants Larsen

*Framhald a bls. 8*

















# Fuglafjørður

býurin, har mentan og vinnulív taka lógvatak

býurin, har náttura og fólk eru blíð

býurin, har fortíð og nútíð hittast

býurin, har øldirnar tala

**Stutt sagt:**

býurin, har nógv hendir

býurin, ið er eina vitjan verdur

**Fuglafjarðar Kommuna**
P.O. Boks 30 · tel. 444006 · fax 444657
fko@fuglakomm.fo
www.fuglakomm.fo

# TIPS 13

## VEDDA OG VINN VIÐ BIRGARI OG JANUSI

Aftur í ár skipa teir báðir Birgar og Janus – sum nú búgva í avíkavist Keypmannahavn og Aberdeen – fyri kappingini "vedda og vinn við Birgari og Janusi". Besti tipparin í einstøku kappingunum vinnur ein kassa av sodavatni frá Føroya Bjór. Umframt vikuvinningin sleppa allir 9 vinnararnir út at bowla saman við 1. liðsleikarunum eftir kappingina. Vinnararnir eru eisini við í lutakastinum um ein APEX-flogferðaseðil frá Atlantic Airways.

Fyri at luttaka og vinna, skalt tú seta kross í tann rútin (1, X ella 2), ið tú heldur eru rættir. Skriva navn, bústað og tlf.nr. og lat hann inn í ovaru hædd í Ítrottarhúsinum undir ella beint eftir dystin. Tann ella tey, sum hava svara flest spurningum rætt, eru við í lutakastinum um sodavatns-kassan. Góða eydnu!

*Røttu svarini til spurningarnar hesaferð fært tú at vita í næstu leikskrá.*

*TIPS 13-seðilin skal latast inn í ovaru hædd í ÍF-húsinum í seinasta lagi 15 minuttir eftir loknan dyst.*

| 1. UMFAR (set x í rætta rútin) | 1 | X | 2 |
|---|---|---|---|
| 1. Hvussu eitur hjálparvenjarin hjá ÍF? 1. Bogi Lervig X. Rógvi Róin 2. Trúgvi Nesá | | | |
| 2. Hvør gjørdist steypavinnari hjá monnum í fjør? 1. B36 X. GÍ 2. NSÍ | | | |
| 3. Hvussu eitur russiski eigarin í Chelsea? 1. Igor Dobrovolski X. Roman Abramovic 2. Ivan Ståpåvandski | | | |
| 4. Nær er FSF stovnað? 1. 1946 X. 1971 2. 1979 | | | |
| 5. Hvør er, við tveimum leikdøgum eftir italskur meistari 2003/04? 1. Juventus X. AS Roma 2. AC Milan | | | |
| 6. Hvør var fyrstur úr ensku 1. deild at tryggja sær eitt pláss í Premier League næsta kappingarár? 1. West Bromwich Albion X. Norwich City 2. Sunderland | | | |
| 7. Nær flutti ÍF síðst upp úr 2. deild? (Í fjør ikki íroknað) 1. 1995 X. 1997 2. 1998 | | | |
| 8. Hvussu eitur spælarin, ið GÍ hevur lænt úr FCK? 1. Vitus Kofoed X. Jesper Bech 2. Martin Bergvold | | | |
| 9. Hvør spælir á heimavølli á Fritz-Walter Stadium? 1. 1.FC Kaiserslautern X. Vfb Stuttgart 2. Eintracht Frankfurt | | | |
| 10. Hvussu nógvar landsdystir spældi Eric Cantona á franska landsliðnum? 1. 31 dystir X. 38 dystir 2. 43 dystir | | | |
| 11. Hvør bleiv kosin ársins leikari í fronsku kappingini í ár? 1. Djibril Cissé X. Didier Drogba 2. Pegguy Luyindula | | | |
| 12. Hvussu nógv av teimum 16 londunum í EM 2004 eru limir í Evropa Samveldinum (EU)? 1. 10 X. 12 2. 14 | | | |
| 13. Dysturin ímillum ÍF og NSÍ er í gongd og mitt í tí heila sær dómarin, at Eyðolvur stendur á miðjum vølli við sigarett í munninum og snakkar í fartelefon. Hvat ger dómarin? 1. Biður Eyðolv fara av vøllinum at roykja og snakka í fartelefon X. Gevur Eyðolvi gult kort fyri ósømiligan atburd 2. Gevur Eyðolvi reytt kort fyri ósømiligan atburð | | | |

Føroya Bjór

ATLANTIC AIRWAYS

Navn: Bústaður: Telefon:

Klipp ella skrædd



FELAGSARBEIÐI

# ÍF stuðlar virknir í hálvt ár




27. september síðsta ár tóku fimm fótbóltsáhugaðir fuglfirðingar seg saman, og stovnaðu áhugafelagið ÍF stuðlar. Samstundis varð avgjørt at fáa nakrar persónar afturat at mynda felagið. Hetta gekk bæði skjótt og væl, tí áhugin fyri fótbólti í bygdini var og er stórur. Í dag mynda ellivu mans felagið. Høvuðsendamál felagsins er at stuðla ÍF fótbólti. Í ár umfatar arbeiðið fyrst og fremst 1. deild hjá monnum í fótbólti, hetta at skilja, at felagið skal fáa til vega pening til rakstur av besta fótbóltsliðnum í bygdini. Umframt hetta er eitt av endamálum felagsins at fáa til vega leikarar til felagið.

### Uppgávur felagsins

Felagið hevur fingið heimildir frá aðal- og fótbóltsnevnd ÍF´s at taka sær av eitt nú høvuðsstuðlum hjá 1. deild, lýsarum, leikskrá, klæðnasáttmálum v.m. Eisini fer felagið at skipa fyri tiltøkum av ymiskum slagi. Seinasta tiltakið, sum felagið skipaði fyri, var uppboðssøla av málningum og lutaseðlasøla á Torginum í SMS, har fitt av peningi kom í kassan. Í løtuni fer stórur partur av orkuni í at leggja síðstu hond á fyrireikingarnar til venjingarleguna hjá 1. deild í Aalborg í summar, umframt at selja lýsingarskelti við vøllin.

### Tilboð til limirnar

Felagið avgjørdi beinanvegin, at ÍF fjepparar skulu merkja, at vit nú leika í 1. deild og harvið er eisini áhugin fyri liðnum og felagnum størri. Av serligum tilboðum, hevur felagið í fyrstu atløgu gjørt tvey kort, sum geva ávís rættindi.

### Árskort

Felagið bjóðar eitt sokallað árskort, sum gevur ókeypis atgongd til allar heimadystir hjá 1. deild monnum í fótbólti kappingarárið 2004. Tað verða leiktir í øllum førum 12 landskappingar- og steypadystir í 2004. Eitt árskort kostar kr. 700,00 fyri árið.

### Gullkort

Kortið er eitt sokallað VIP-kort, sum gevur nøkur serlig rættindi til ánaran, m.a. ókeypis atgongd til allar heimadystir, til øll tiltøk, sum ÍF stuðlar skipa fyri og atgongd til VIP-rúm í sambandi við ávísar dystir í kappingarárinum 2004. Gullkortið kostar 4.000 kr. Bæði kortini eru strangliga persónlig og fáast við at tosa við ein av nevndarlimunum í ÍF stuðlum.

### Peningaligur stuðul

Annars ber eisini til at stuðla felagnum við at gjalda eina ávísa peningaupphædd . t.d. eina fasta mánaðarliga ella árliga flyting á konto nr. 140.181.7 í Føroya Saprikassa ella 167.770.7 í Føroya Banka.

*Framhald fra bls. 2*

gjørdi sáttmála við, skuldu hava spælt í 1. deild. Ynskiligt varð eisini, at sáttmáli bert varð gjørdur við føroyskir leikarar. Og tey aðalmálini eru hildin. Vit halda ikki, at vit taka munnin ov fullan, um vit siga, at nýggju leikararnir hava roynst væl higartil.
– Ikki tí; allir leikararnir og eisini fólkið kring liðið hava gjørt eitt valarbeiði higartil. Vit vóna, at tit halda fram; ikki bert í dag, men alt árið, so røkka tit langt, tí vit hava eitt gott lið.
Góðan dyst.

*Framhald fra bls. 3*

skoraði málið í Fuglafirði og annað í Havnini. Hitt skoraði Birgir Thomsen upp á brotsspark. Í 1987 stóð nógv á, áðrenn HB hevði bast ÍF, sum spældi í 2. deild. Eftir umdyst var 2-2. Í nýggjari finalu vann HB 3-0.

Sammett við seytjan FM sigrar eigur KÍ ikki nógvar steypasigrar. Í 1966 og 1967 vunnu teir finalur í Gøtu. Fyrra árið 4-2 á HB og tað seinna 6-1 á B36. Steinbjørn Jacobsen, sum var farin til Fuglafirðar at vitja familjuna, var eitt sindur seinur. Tí spældi KÍ fyrstu løtuna við tíggju monnum. So kom Steinbjørn, og hann skoraði fimm av teimum seks KÍ málunum! Hinir tríggir KÍ sigrarnir: 6-1 á GÍ í 1990, 2-1 á B71 í 1994 og í 3-1 á B36 í 1999.

ÍF og KÍ hava ongantíð spælt finalu ella hálvfinalu ímóti hvørjum øðrum. 8. mai í 1998 ella í dag fyri seks árum síðani spældu tey fjórðingsfinalu í Klaksvík. KÍ vann 3-1. Heðin á Lakjuni, Marek Vierzbicki og Olgar Danielsen gjørdu KÍ málini, og Bartal Eliasen javnaði til 1-1. Nú er spurningurin, hvussu tað fer at roynast hesa ferð.







**Alfa Seafood Spf**
Box 10 • FO-530 Fuglafjørður • Tlf. +298 44 49 51
Fax +298 44 48 48 • Fartlf. +298 22 54 75
E-mail: alfa@post.olivant.fo


Koyrið á ÍF....
..eg stuðli í øllum førum
SMS tel. 31 30 11
MIKLAGARÐUR


Ferðaseðlar www.fonnflog.fo
kring allan knøttin
FONN FLOG
FO-700 Klaksvík · Tel. 456363 · Fax 457373 · fonnflog@fonnflog.fo


GRANNSKOÐARASTOVAN Sp/f
480 Skála tel. 44 16 66 fax 44 18 71


Heiðursmerkir
Landsins størsta og besta úrval
Alt innan ítróttarheiðursmerkir, steyp, heiðursmerkir, stakar, plattar...
EILIF ARGE
Klaksvíksvegur · 700 Klaksvík
Tel. 455164 · Fax 457576 · arge-kl@post.olivant.fo


Piddasahandil og Ribarhús
listaframsýningar
heimavirkaðir prýðis- og brúkslutir
føroyskt - »bundið og tøvt« í meturmál
føroyskar fløgur
loppumarknaður
- og altíð ein kaffimuður við »heimabakaðum«
opið er: mán. - frí. 15.00 - 17.30
ley. 11.00 - 13.00
annars eftir avtalu á tlf. 44 44 27
hugnaligt og kveikjandi umhvørvið mitt í býnum í Fuglafirði




s.pf JAN MOHR

Timbur- snikkara- og betongarbeiði

Tlf. 44 49 49 Fartlf. 21 99 49-21 89 49



BARNAÚTGERÐ
Ciconia

tel 45 65 30
fax 45 65 31

Klaksvíksvegur 63 · boks 163 · Klaksvík



tann nýggi 407

PEUGEOT

Meinhardt Arge


TOYOTA
TOYOTA AVENSIS
AVENSIS
REYNI SERVICE P/F
Vegurin Langi · 188 Hoyvík · Tlf. 353040 · Fax 353041
www.reyniservice.fo · rs@reyniservice.fo


FAROE
Fiskavirkið í Fuglafirði




Tilfar til umvælingar,
abøtur ella annað ...
... spyr fyrst hjá okkum!
Fuglafjarðar Timburhandil
tel. 444 126


LEVI'S®
RED TAB®
JEANS
Klæði til hennara,
hansara og børnini
- nu lat undir somu lon
VØRDSLAN
WEARHOUSE
Í Støð 6, Fuglafjørður, tel 44 47 47

# Rustviðgerð ella forrútar

vit hava loysnina

BE AUTOGLAS

Í Brekkum 1
530 Fuglafjørður
tel. 444 215
fax 444 813
fartel. 220 876

BREYÐMOLIN
530 Fuglafjørður • Telefon 444388

WWW.FAROEDIVE.FO
TLF. 218929 / 224224






fk

**Fuglafjarðar Keypssamtøka**
Tel 444095 - 444495
Fax 444895 Far 217095

FARPACK

Staravegur 5 • P.O.Box 3099 • FO-110 Tórshavn
Telefon 353000 • Fax 53010
www.farpack.com • e-mail: farpack@farpack.com





Alt snikkaraarbeiði verður gjørt.
Øll sløg av vindeygum, hurðum, trappum umframt ymiskar seruppgavur.

Tel 31 71 66 • Fartel 21 71 56
Fax 31 81 31 • Hvalsoyargøta 11

**Træsmiðjan GLT**



**Fjølbroyttur veitari til vinnuna**

KJ er ein fjølbroytt fyritøka, sum veitir útgerð, eykalutir og tænastur til fiskivinnuna, alivinnuna, flutningsvinnuna og entreprenørvinnuna. Í okkara úrvali av útgerð finst m.a. trolspøl, kranaspøl, marinekranar, lastbilakranar og gravimaskinur. Í okkara stóru eykalutagoymslu hava vit hydraulikkfittings, slangur, rør, pumpur, motorar, ventilar, koblingar, tetningsringar o.m.a.



- Spøl
- Kranar
- Hydraulikklutir
- Filtur
- Aliútgerð
- Katamaranar



**KJ HYDRAULIK**

P.O. Box 110 á Kambsdalur · Tel +298 444 170 · Fax +298 444 265 · info@kj-hydraulik.com · www.kj-hydraulik.com




*Reiðari innan frakt- & sandbátar*
*Krana- og lastvognskoyring*
*Sandsøla*

**SANDGREVSTUR**

Stovnað 1949

530 Fuglafjørður
tel. 444 121
fax 444 921



## Tannlæknastovan

Steintór Larsen tannlækni

Brynhild Maria Lamhauge tannrøktari

Viðtala:
8.00-12.00 og 13.00-16.00

Torkilskrókur 8 530 Fuglafjørður tel. 444 358

Vit hava stórt úrval av gløsum, serviettum, dúkum, ljósum og einnýtisborðbúnaði.

Ert tú í iva um mongd, lit ella stødd, ráðgeva vit tær fegin. Vit taka óásettar pakkar aftur.

*Brúðleyp Dóp Veitslu*
*Merkisdag Meistaraheit*



th-dam@post.olivant.fo

**Thomas Dam á Hálsi**
HÚSGØGN · LEIKUR · NÁTTÚRUDEILD · HEILSØLA
HEYKAVEGUR 3 · TLF. 31 14 00

# Timburmeistari

Ingi W. á Tórgarði Tlf. 22 61 12
Bøvegur 12, 530 Fuglafjørður

- Alt Timbur-, snikkara- og stoypiarbeiði
- Sethúsabygging
- Virkisbygningar
- Umvælingar

**Dygd = Trygd**

# SAMKEYP

-tí tað lønar seg

**NORÐAGØTA**

telefon. . . . . . . . . 44 11 19
skrivstovan . . . . . 44 18 77
fax. . . . . . . . . . . . 44 21 60
fartelefon. . . . . . . 21 03 46

PW

Opið er
manadag - sunnudag kl. 9.00-23.00
p-w@post.olivant.fo




## Skoda Fabia

Frá 132.750

Nógv fyri pengarnar • 10 ára rustgaranti

HONDA NORÐBIL SKODA HYUNDAI

Box 1070 • Oyggjarvegur • Tórshavn • Tel 31 37 07 • Fax 31 08 55



## Góðskan á arbeiðnum altavgerandi

Nýbygging
Umvæling
Ráðgeving
Tekningar
Kostnaðarmetingar



# JLJ-Bygging

Verkfrøði og húsasmíð

690 Oyndarfjørður
Tel 21 47 87 & 44 47 87
t-postur: jljuul@post.olivant.fo










Timbur-, betong- og jørðarbeiði

H.K.J. byggivirkið
Postmoga 40
530 Fuglafjørður
Tel. 21 86 96 og 22 77 99
Fax 44 46 56










OROBLU
Seamless Collection
Alt innan húðrøkt frá
LANCÔME
BIOTHERM
Undirklæði frá
FILA
Ninni
Parfumeri • Lingeri
Fuglafjørður • tel 444344


PrimaVera
ja, tað má tað vera!
Pizzaria
PrimaVera
á Kambsdali tlf. 444446


Álvaskot
Fysioterapiviðgerðarstova
530 Fuglafjørður
Telefon 44 51 44
Álvur Hansen, fysioterapeutur
Turið L. Petersen, fysioterapeutur


Føroya størsta
úrval av
teldum og tilhoyri
Støkkið inn á gólvið
SpF Teldu Tænastan
Staravegur 5 - 110 Tórshavn - Tlf. 317620 - Fax 317699 - info@tt.fo - www.tt.fo


Umvæling og søla av:
BAADER - maskinum
FOMACO - salt sprøjtum
og ymiskum úr rustfríum
stáli.
Eisini selja vit: legur,
POM, bronsu, messing,
boltar og møtrikkar v.m.
P/F Petur Larsen
Bakkavegur - FO-530 Fuglafjørður
tlf. 444174 - fax 444285 - t-post: ol@online.fo
DIMMALÆTTING 341200


HAVSBRÚN
Tel. 41 44 00 • Fax 41 44 01 • havsbrun@havsbrun.fo • www.havsbrun.fo

# LEIKARIN HESA FERÐ KARSTIN JOENSEN



## TÚ

**Navn:** Karstin Joensen
**Føðingardagur:** 28-05-1982
**Starv:** Elektrikari
**Hædd og vekt:** 175 cm; 74 kg.
**Størsta styrki:** Á strikuni
**Størsti veikleik:** Tað lata vit vera hemmiligt, mótstøðumenninir lesa hetta jú eisini.
**Torførast mótstøðumaður:** Einar Petersen (TB) hehe
**Frítíðarítriv:** Koyri Lexus og gangi túr við Luca (hundinum)
**Vónir fyri 2004:** Um vit blíva við at halda okkum frammanfyri HB, so røkka vit langt.

## TÍN ÍTRÓTT

**Pláss á vøllinum:** Málmaður
**Fyrsti dystur á 1. liðið:** GÍ í Gøtu fyrsta landskappingardystin í fjør
**Nær spældi tú fyrstu ferð fyri ÍF:** Tað má vera B68 á Toftum í steypakappingini (5-2 til ÍF)
**Aðrar ítróttargreinar:** Hondbólt og fyrrverandi Føroyameistari Aerobic
**Minningarríkasti dystur:** Finalan í Unglingadeildini móti ÍF ( 7-2 til okkum, ÍF tapti)
**Størstu fótbóltsliga ávirkan:** Beiggi mín (Kristian Joensen)
**Besti fótbóltsleikari:** Gianluca Pagliuca málmaður hjá Bologna
**Um ikki fótbólt, hvørja ítróttargrein hevði tú so valt:** Runnið marathon
**Hvat slag av venjing dámar tær best:** Intervalvenjing
**Hvat slag av venjing dámar tær ikki:** Eg HATI taktiska venjing
**11 teir bestu fótbóltsleikararnir í heiminum:** Pagliuca, Carlos, Ronaldinio, Zidane, Nesta, Henry, Van Nistelrooy, Totti, Ferdinand, Beckham, og til síðst men ikki minst "The Grand Old Man" Tórstein Joensen.

## TÍNIR FAVORITTAR

**Matur og drekka:** Hvítanýrir og eitt gott glas av livralýsi
**Besta árið og hví:** 1968, tá Beatlarnir vóru í hæddini, tað var ein tíð, eg minnist afturá við gleði
**Slag av tónleiki:** Føroyskur tónleikur
**Besta sending í SvF:** Oggy og kakelakkarnir og Mánadagsskráin.
**Besti filmur:** Aerobic bandið við Martin, Trygva og mær sum høvuðsleikarar.
**At slappa av:** Sovi
**Besti fótbóltsleikari yvirhøvur:** Gianluca Pagliuca
**Stuttligasi persónur:** Tað er uttan iva Roy Róin.
**Sjónvarp/filmstjørna:** Tórður Mikkelsen
**Sangari/sangarinna:** Hanus G Johansen og Kári P.
**Besta bók/blað:** SMS blaðið við Rúna Elttør í ongum hosum á forsíðini.



# Lítla sølubúðin í ítróttarhúsinum

Damurnar, sum síðstu árini hava havt sølubúð í ovaru hæddini í ítróttarhúsinum í sambandi við dystir hjá 1. liðnum, eru aftur í ár til dystin fús, sjálvt um umstøðurnar eru avmarkaðar. Hildigarð stendur fyri, men hon fær góða hjálp frá øðrum. Í sølubúðini selja tey sodavatn, kaffi, te, køkur og góðgæti. Sølubúðin hevur opið frá dystarbyrjan til nakað eftir dystin. Tað er eisini í sølubúðini, at tey, sum atkvøða um ársins ÍF´ara og tey sum gita í kappingini ÍF TIPS 13, skulu lata seðlarnar inn.

Sjálvt um hølisviðurskiftini ikki eru av teimum bestu, so er tað eisini í sølubúðini, at prátið um dystin, leikararnar og venjarin fer fram - bæði í hálvleikinum og eftir dystin. So verið vælkomin øll somul.

# Vinn APEX-flogferðaseðil við einum tennisbólti



Hetta ljóðar kanska eitt sindur løgið, men tað ber veruliga til, væl at merkja, um tú ert til 1. deildardyst í Fuglafirði. ÍF skipar í ár fyri nýggjum og forvitnisligt tiltakið ísambandi við heimadystirnar hjá 1. deild. Til hvønn dyst fara gentur á gentuliðnum 12-14 ár og foreldur teirra at selja tennisbóltar við vøllin. Bóltarnir, sum kosta 30,- fyri hvønn, verða seldir fram til hálvleik, tá tit skulu royna tykkum. Tá ræður nevnliga um at kasta bóltarnar út á sjálvan vøllin, og tann bólturin, sum liggur næst (nærmast) sjálvan miðblettin, hevur vunnið APEX-flogferðaseðilin frá Atlantic Airways. Um fleiri bóltar hava somu frástøðu frá miðblettinum verður lutakast millum hesar. Einasta treytin annars er, at tit standa uttanfyri girðingina við vøllin og kasta bóltin ella bóltarnar. Flogferðaseðilin er galdandi á øllum ferðamálunum hjá Atlantic Airways. Góða eydnu.

**Starvsnevnd:**
Formaður
Rúni Petersen, 556661
Varaformaður
Sámal Hansen, 212088
Skrivari
Høgni á Lakjuni, 444418
Peningarøkil
Linda Joensen 222180
Tiltakslimur:
Petur við Gjónna
**Fótbóltsdeild**
Tórstein Joensen, 444706
Eivin Breiðaskarð, tel. 214003
Guneif Berjastein, 745041
Hildigarð Eliasen, 228771
Atli Petersen, 268295
Ólavur Larsen, 224659
Samskipanarleiðari:
Hildigarð Eliasen, 228771
**Venjarar**
**1. deild**
Sigfríður Clementsen, 317659/517659
**3. deild**
Mortan Thomsen, 214404
**4. deild**
Esbern Abrahamsen, 744593
**Old Boys**
Kristian Petersen, 444700
**Unglingar**
Ólavur Larsen, 224659
**Dreingir Ø.**
Ólavur Larsen, 224659
**Smádr. Ø**
Ørvar Jacobvsen 268685
**Piltar ½ vøll**
Njál R. Petersen, 444994
**Smápiltar**
Hagbardur Joensen, 212636 og Ørvar Jacobsen, 268685
**Gentur**
Jonn S. Thomsen, 229859 og Ørvar Jacobsen 268685
**Smágentur**
Ørvar Jacobsen, 268685
**Gentur 10-12**
Sarita Jacobsen, 253383 og Nikolina Kristiansen, 744060
**Pinkur a-b**
Hanna Poulsen, 262402

**Krana- & Lastvognskoyring**

Tel. 217 245 - 284 245 - 444 245

**døgg**

.alt innan nýmótans hárviðgerð.

Halla Olsen
tlf. 219379
tlf. 445550

Anja Kleminsdóttir
tlf. 258300

opið er:
mán - frí 10 - 17
hósdag 10 - 19
leygardag 10 - 14



Toftavegur 1 · 530 Fuglafjørður · tlf. 44 55 50

**BERGFROST**
COLD STORAGE

P.O.Box 85
FO-530 Fuglafjørður
Faroe Islands
www.bergfrost.com

Tel +298 44 46 11
Fax +298 44 46 07
Mobile +298 22 36 67
bergfrost@bergfrost.com

**AP BUSSKOYRING**

V/ Andreas Poulsen
22 52 20 - 44 17 20

# Fuglafjaðrar Træsmiðja

við Jóhan Larsen

**Snikkaraarbeiði**

- Vindeygu
- Úthurðar
- Trappur
- Umvælingar

Tel: 44 42 34
Tel: 21 42 34
Toftagøta 12
530 Fuglafjørður

DIMMALÆTTING 341200

# Sv - TRANSPORT

530 Fuglafjørður tel. 44 41 77

**Allur flutningur við:**

Lastbilum | Kranabilum | Trailarum
Dumparum | Bingjubilum

# ÁRSINS ÍF-ARI 2004

## Tað skal eisini vera stuttligt at vera leikari og áskoðari ...

Aftur í ár fara vit at skipa fyri eini kapping, har tit kunnu velja 3 teir bestu leikararnar hjá 2. deild monnum. Atkvøtt verður til allar heimadystirnar í landskappingini ella íalt 9 dystir.

Tann leikarin, sum veljarin heldur hevur spælt best, fær 5 stig, næstbesti 3 stig og triðbesti 2 stig. Síðan verður talt saman eftir hvønn dyst og úrslitið sæst í leikskránni til komandi dyst. Atkvøðuseðlarnir fáast í ovaru hæddini í Ítróttarhúsinum. Seðilin her á síðuni kann eisini nýtast. Hvør veljari hevur bert loyvi at lata ein seðil inn til hvønn dyst. Atkvøðuseðilin skal latast inn í ovaru hæddina í Ítróttarhúsinum í seinasta lagi 15 minuttir eftir loknan dyst.



**Hanus gjørist ársins ÍF-ari síðsta ár**

Hanus Eliasen vann kappingina síðsta ár við 436 atkvøðum. Honum á baki kom Áki Petersen við 418 atkvøðum, meðan Eyðolvur R. Petersen gjørdist nr. 3 við 274 atkvøðum.

## VINNINGAR

Ársins ÍF-ari fær 1.000,-
Nr. 2 fær 500,-
Nr. 3 fær 500,-

Fa. Eilif Arge í Klaksvík letur prýðislutir til nr. 1, 2 og 3

EILIF ARGE

Restaurant Munta letur sunnudagsdøgurða fyri tvey til besta leikaran í hvørjum av landskappingardystunum í ár

Restaurant Munta

Tá ið kappingarárið er av, verður lutakast millum allar atkvøðuseðlarnar um eitt krov frá Haraldsen

HARALDSEN *litt keyp*

## ATKVØÐUSEÐIL ÍF-KÍ, 8. mai 2004

Nr 1 (5 stig) ____________________

Nr 2 (3 stig) ____________________

Nr 3 (2 stig) ____________________

Veljari / tel: ____________________

Atkvøðuseðilin skal latast inn í ovaru hædd í ÍF-húsinum í seinasta lagi 15 minuttir eftir loknan dyst



## STØÐAN 1. DEILD MENN - 4. MAI

| | Lið | D | V | J | T | V - T | S | Heima | Uti |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | GÍ | 2 | 2 | 0 | 0 | 5 - 2 | 6 | 1 - 0 - 0 | 1 - 0 - 0 |
| 2 | B36 (s) | 2 | 1 | 1 | 0 | 6 - 2 | 4 | 1 - 1 - 0 | 0 - 0 - 0 |
| 3 | Skála | 2 | 1 | 1 | 0 | 3 - 1 | 4 | 1 - 0 - 0 | 0 - 1 - 0 |
| 4 | KÍ | 2 | 1 | 1 | 0 | 3 - 2 | 4 | 1 - 0 - 0 | 0 - 1 - 0 |
| 5 | ÍF (u) | 2 | 1 | 0 | 1 | 6 - 5 | 3 | 1 - 0 - 0 | 0 - 0 - 1 |
| 6 | VB | 2 | 0 | 2 | 0 | 1 - 1 | 2 | 0 - 1 - 0 | 0 - 1 - 0 |
| 7 | NSÍ | 2 | 0 | 1 | 1 | 3 - 5 | 1 | 0 - 1 - 0 | 0 - 0 - 1 |
| 8 | HB (m) | 2 | 0 | 1 | 1 | 1 - 3 | 1 | 0 - 0 - 0 | 0 - 1 - 1 |
| 9 | EB/Str. | 2 | 0 | 1 | 1 | 0 - 4 | 1 | 0 - 1 - 0 | 0 - 0 - 1 |
| 10 | B68 | 2 | 0 | 0 | 2 | 0 - 3 | 0 | 0 - 0 - 1 | 0 - 0 - 1 |

## LEIKARAHAGTØL 1. DEILD MENN 2004

| | Leikari | Min | D | Ut | Inn | G | R | M | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Fróði Poulsen | | | | | | | | |
| 2 | Áki Petersen | 180 | 2 | | | | | 1 | |
| 3 | Sverri Ellingsgaard | | | | | | | | |
| 4 | Viggo Johannesen | 180 | 2 | | | | | | |
| 5 | Roy Róin | 135 | 2 | 2 | | | | | |
| 6 | Bartal Eliasen | 180 | 2 | | | | | | |
| 7 | Bárður á Lakjuni | 24 | 1 | | 1 | | | | |
| 8 | Fritleif í Lambanum | 180 | 2 | | | 1 | | | |
| 9 | Atli Petersen | | | | | | | | |
| 10 | Hanus Eliasen | 180 | 2 | | | | | | |
| 11 | Eyðolv Petersen | 180 | 2 | | | | | 1 | |
| 12 | Árni Jóhan Petersen | 180 | 2 | | | | | | |
| 13 | Høgni á Lakjuni | | | | | | | | |
| 14 | Ken Bærentsen | | | | | | | | |
| 15 | Eyðun Ryggshamar | 30 | 1 | | 1 | | | | |
| 16 | Kartin Joensen | 180 | 2 | | | | | -5 | |
| 17 | Høgni Zachariassen | | | | | | | | |
| 18 | Rúni Eyðunsson Eltør | 179 | 2 | 1 | | | | 2 | |
| 19 | Teitur Joensen | 17 | 2 | | 2 | | | | |
| 20 | Jónn Sólheim Thomsen | | | | | | | | |
| 21 | Tórstein Joensen | 1 | | | 1 | | | | |
| 22 | Grias Ellingsgaard | | | | | | | | |
| 28 | Magni á Lakjuni | 154 | 2 | 2 | | 1 | | 1 | |

*FRÁGREIÐING: D: Dystir, Min: Minuttir leiktir, Út: Dystir útskiftur, Inn: Dystir innskiftur, G: Gul kort, R: Reyð kort, M: Mál, Stig: í kappingini ársins ÍF-ari*

## VERT AT VITA

Dysturin í dag er fjórðingsfinalan í kappingini um Løgmanssteypið. Í innleiðandi bólkinum gjørdust vit nr. 2 í okkara bólki og samstundis eisini besti 2 ´ari í teimum trimum bólkunum. Hetta hevði við sær, at vit fingu heimavøll í dag. Tað liðið, sum vinnur dystin í dag, fer beinleiðis í hálvfinaluna, har liðið skal spæla ímóti vinnaranum av dystinum GÍ-NSÍ. Í hálvfinaluni verða leiktir tveir dystir, ein á heimavølli og ein á útivølli. Hesir dystir verða leiktir ávíkavist 23. mei og 3. juli. Næsti dysturin hjá okkum í landskappingini er 16. mei ímóti Skála á Skála.

### Aðrir dystir í dag í steypakappingini

B36 – VB
GÍ – NSÍ
HB – EB/Streymur (spældur í morgin)

### Dystir í 1. deild 16. mai 3. umfar

KÍ-EB/ST
SKÁLA-ÍF
HB-VB
GÍ-B36
NSÍ-B68

### Dystir í 3. deild 16. mai 3. umfar

SÍ - EB/Streymur
NSÍ - B68
HB - TB
SKÁLA - ÍF
GÍ - FRAM

### Málskjúttar 1. deild

| | |
|---|---|
| Áki Mørk, B36 | 2 |
| Rúni Eltør, ÍF | 2 |
| Erling Fles, KÍ | 2 |
| Bárður Mortansson, B36 | 1 |
| Hans Pauli Petersen, GÍ | 1 |
| Krzystof Popczynski, GÍ | 1 |
| Súni Olsen, GÍ | 1 |
| Heine Fernandez, HB | 1 |
| Áki Petersen, ÍF | 1 |
| Jacob Bymar, KÍ | 1 |
| Sjúrður Jacobsen, NSÍ | 1 |
| Bárður Danielsen, Skála | 1 |
| Jonhard Fredriksberg, Skála | 1 |
| Pauli Hansen, Skála | 1 |
| Milan Kulic, VB | 1 |
| Ian Højgaard, NSÍ | 1 |
| Helgi L. Petersen, NSÍ | 1 |
| Egil á Bø, B36 | 1 |
| Niels Joensen, B36 | 1 |

# ÍTRÓTTARFELAG FUGLAFJARÐAR

## ÍF-LIÐIÐ

1 Fróði Poulsen
2 Áki Petersen
3 Sverri Ellingsgaard
4 Viggo Johannesen
5 Roy Róin
6 Bartal Eliasen
7 Bárður á Lakjuni
8 Fritleif í Lambanum
9 Atli Petersen
10 Hanus Eliasen
11 Eyðolvur R.-Petersen (liðsk.)
12 Árni J. Petersen
13 Høgni á Lakjuni
14 Ken Bærentsen
15 Eyðun Ryggshamar
16 Kartin Joensen
17 Høgni Zachariassen
18 Rúni Ey. Eltør
19 Teitur Joensen
20 Jonn S. Thomsen
21 Tórstein Joensen
22 Grias Ellingsgaard
28 Magni á Lakjuni

**Venjari:**
Sigfríður Clementsen
**Hjálparvenjari:**
Bogi Lervig
**Liðleiðarar:**
Símun Fornagarð
Eilif Eliasen
**Fysioterapeut:**
Álvur Hansen

## KÍ-LIÐIÐ

1 Jákup Mikkelsen
2 Jakup Hansen
3 Leon Bjartalíð
4 Jan Andreasen
5 Harley Bertholdsen
6 Arnold Joensen
7 Símun Joensen
9 Jacob Bymar
10 Stig Edvin Aksnes
11 Atli Danielsen (liðsk.)
12 Marek Vierbiczki
13 Aleksander Djordjevic
16 Andreas Johannesen
17 Erling Fles
18 Eyðun Klakkstein
20 Niclas Niclasen
21 Jan Joensen

**Venjari**
Ove Flindt-Bjerg
**Liðleiðari**
Thom Jacobsen



**BIRGIR SONDUM**
**Regin og Georg úr B36**

**PETUR ABRAHAMSEN**